Føroya Skipara-og Navigatørfelag:

# Vrakaðu – men høvdu hurð á gloppi

**– Vit viðgjørdu semingsuppskotið gjølla, men her var einki at gera. Tað var ein samd nevnd, sum vrakaði tað, sigur Regin Nónstein, næstformaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag**



*– Tað kom óvart á, at Føroya Reiðarafelag skjeyt upp at lata limafeløgini samráðast hvørt sær við okkum, sigur Regin Nónstein, næstformaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

SAMRÁÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Regin Nónstein, næstformaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag, sigur, at felagið var slett ikki nøgt við semingsuppskotið, sum semingsmenninir, Terji Sigurðsson og Jóannes Djurhuus, løgdu fyri partarnar í seinastu viku, og sum bæði FSN og Føroya Reiðarafelag vrakaðu.

– Nevndin í FSN viðgjørdi uppskotið gjølla, men her var einki at gera. Tað var tí ein samd nevnd, sum vrakaði tað. Á fundinum hósdagin, tá ið vit skuldu svara semingsstovninum, høvdu vit eitt bræv við okkum, har vit søgdu, hvørji viðurskifti vit vóru sinnaðir at tosa nærri um. Sostatt vrakaðu vit uppskotið, men høvdu samstundis eina hurð á gloppi. Vit vildu lika sum vísa á eina gongda leið, um samráðingarnar hildu fram.

Føroya Reiðarafelag avgjørdi eisini á limafundi hósmorgunin at vraka semingsuppskotið, men skjeyt upp, at tey átta limafeløgini hvør sær tóku upp samráðingar við Føroya Skipara-og Navigatørfelag.

Úrslitið varð, at feløgini samdust um at leingja verandi sáttmála fram til 1. apríl í ár og at taka samráðingarnar uppaftur sum skjótast.

### Langt ímillum

Regin Nónstein sigur, at feløgini hava staðið langt frá hvørjum øðrum í hesum samráðingunum, og at tað serliga er luttøkan í øktum oljuútreiðslum og sáttmálin um teir stóru flakatrolararnar, eins og sáttmálin um ídnaðarskipið, Sheanne, sum skilti partarnar.

– Skálaberg hevur havt ein sersáttmála, men Føroya Skipara-og Navigatørfelag vil hava allar teir stóru trolararnar undir somu viðurskifti, bæði tá ið roynt verður í Barentshavinum og í Irmingarhavinum.

Hann vísir á, at Sheanne siglir eftir ídnaðarsáttmálanum, ið varð gjørdur fyri teir smáu bátarnar, sum royndu í Norðsjónum. Hesir høvdu einar 4-6 mans umborð, men manningartalið umborð á Sheanne liggur millum 9 og 10.

– Tað er krav, at Sheanne hevur tveir stýrimenn, men ídnaðarsáttmálin er ikki gjørdur til tveir stýrimenn.

FSN vildi tí hava, at Sheanne kemur undir sama sáttmála sum gamli Jupiter sigldi undir.

### Felags viðurskifti

Regin vísir á, at tað eru fleiri viðurskifti, sum eru galdandi fyri øll manningarfeløgini, og her er eitt nú talan um uppsagnarreglur, avskeiðing og endurgjald. Somuleiðis er kryvjimaskinan ein partur.

– Í sáttmálanum millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag er gjørt eitt protokollát, sum bert kemur í gildi, um øll manningarfeløgini kunnu semjast um tey viðurskifti, sum eru í protokollátinum, og her er eitt nú talan um luttøku í øktum oljuútreiðslum og kryvjimaskinan, sum ætlandi verður ein frádráttur av óbýttum, sigur hann.

Nú eingin nýggjur sáttmáli er gjørdur millum FSN og limafeløgini hjá Føroya Reiðarafelag, eru nevndu viðurskifti í umrødda protokolláti ikki galdandi.

### Kom óvart á

Sum skilst á Regini Nónstein, kom tað púrasta óvart á Føroya Skipara-og Navigatørfelag, at Føroya Reiðarafelag á fundinum hósdagin skjeyt upp, at tey átta limafeløgini hvørt sær skuldu samráðast við FSN um nýggja sáttmálan.

– Nei, hetta høvdu vit slett ikki væntað, sigur hann.

Næstformaðurin í FSN sigur seg ikki duga at meta um útlitini, nú farið verður undir nýggjar samráðingar.

– Eg kann tó hugsa mær, at onkrar samráðingar verða lættari enn annars, men hinvegin verða felags reglurnar ivaleyst nøkulunda tær somu fyri allar sáttmálarnar.

### Væntaðu samtykki

Regin sigur annars, at FSN ikki hevði væntað, at Føroya Reiðarafelag fór at vraka seinasta semingsuppskotið.

– Í okkara leiri lá tað í luftini, at reiðarafelagið helst fór at samtykkja semingsuppskotið, men tað gjørdi felagið so ikki, leggur hann aftrat.

Næstformaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag vil einki siga um, hvørt felaga hansara er nøgt við royndirnar hjá semingsstovninum í hesum samráðingunum.

– Nei, tað vil eg einki siga um, tí hesar samráðingarnar hava verið rættiliga truplar, sigur Regin Nónstein, sum at enda vísir á, at felagið áður hevur havt góðar royndir við Terja Sigurðssyni og Jóannesi Djurhuus, tá ið farmaskipasáttmálin varð gjørdur.

# Reiðarafelagið samskipar samráðingarnar

**– Vit meta, at hetta er einasti máti at loysa ósemjuna millum feløgini – um hon loysist yvirhøvur. Hetta er ein nýggj leið, vit hava valt at ganga, tá ið ræður um lønarspurningin, og eg vóni, at hon førir á mál, sigur Jákup Sólstein**

SAMRÁÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein, kennir tað ikki sum eitt niðurlag, at tey átta limafeløgini í reiðarafelagnum nú skulu samráðast hvørt sær um lønarspurningin við Føroya Skipara-og Navigatørfelag.

– Nei, tað geri eg ikki. Vit hava tosað nokso leingi um hetta, og tað er fyri so vítt nevndin, sum eigur uppskotið.

Jákup vísir á, at tað verður reiðarafelagið, sum fer at koordinera samráðingarnar, sum hann tekur til.

– Men eg vænti, at tað verða umboðini fyri hvørt einstakt felag, sum sjálvi fara at sita við samráðingarborðið, tá ið samráðingarnar verða tiknar uppaftur.

Sum formaður í Føroya Reiðarafelag sigur hann seg ganga út frá, at verandi sáttmálar verða grundarlagið undir teimum samráðingum, sum nú standa fyri framman.

– Tað vóru ikki felagsreglurnar, sum eru galdandi fyri fiskimenn, ið skiltu partarnar. Tí vænti eg ikki, at hetta verður tann stóri trupulleikin at loysa, sigur hann.

### Vantandi forstáilsi

Jákup sigur, at orsøkin til, at nevndin í reiðarafelagnum heldur hesa leiðina – kanska – vera gongda, er, at tað tykist so ógvuliga torført at vinna undir land við øllum feløgunum undir einum.

– Umstøðurnar eru so ymiskar, og tí skal forstáilsi til, um lønarsáttmáli skal kunna gerast við øll feløgini undir einum.

Formaðurin í reiðarafelagnum dylur ikki, at hansara áskoðan er, at Føroya Skipara-og Navigatørfelag ikki hevur víst neyðuga forstáilsi í hesum samráðingunum.

– Vit meta tí, at hetta er einasti máti at loysa ósemjuna millum feløgini – um hon loysist yvirhøvur. Hetta er ein nýggj leið, vit hava valt at ganga, tá ið ræður um lønarspurningin, og eg vóni, at hon førir á mál, leggur hann aftrat.

Spurdur, hví feløgini nú skulu samráðast hvørt sær, tá ið tað onnur ár hevur eydnast at vunnið undir land við ølllum feløgunum undir einum, sigur Jákup:

– Ja, tað er nú einaferð soleiðis, at einki stendur í stað, og soleiðis sum støðan er vorðin, vilja vit vita, um hetta er ein máti at loysa knútarnar millum feløgini.

### Ísfiskaflotin

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag sigur, at tá ið verkfall er, verða ísfiskaskipini altíð rakt beinanvegin, meðan eitt nú langfaraflotin og pelagisku skipini í fleiri førum kunnu sigla, sum um einki var hent, tí tey antin eru so langt burtur – ella tí, at tey kunnu landa veiðina aðrastaðni.

Vit spurdu eisini Jákup Sólstein, hvussu tað gekst at fáa Føroya Skipara-og Navigatørfelag at ganga við til nýggju leiðina og at leingja verandi sáttmála fram til 1. apríl í ár.

– Vit skutu upp at leingja verandi sáttmála fram til 1. mars, men eftir uppskoti frá FSN samdust partarnir saman við semingsstovninum um at leingja sáttmálan fram til 1. apríl, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag.